# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kristin Martin Jacobsen, Miðvági**, andaðist sunnumorgunin, 45 ára gamal.

Minningarhald yvir **Honnu Christophersen**, verður í Vestmanna kirkju, týsdagin klokkan 17.00.

**Albert Hansen, Miðvágur**, andaðist sunnudagin, 65 ára gamal.

# Kári og Linda spældu saman

Á forsíðuni á Vikuskiftis-Sosialinum 3.-5. apríl vóru myndir av X-Factor vinnaranum Lindu Andrews og løgtingsliminum Kára á Rógvu, sum nú er doktari í lóg.

Í hesum sambandi hava vit fingið eina mynd av Kára og Lindu sum smábørn. Tey eru javngomul og búðu í hvør sínari síðugøtu til Bókbindaragøtu í Havn, Linda búði í Vallaratúni og Kári í Heimaratúni, har tey spældu nógv saman. Myndin er tikin í 1976.

*Myndaeigari: Sunneva Dalsgaard*

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við vitjan, telefonsamrøðum, talum, sangum, gávum og á annan hátt heiðraðu meg á 85 ára føðingardegnum 10. mars og gjørdu mær dagin so serliga hugnaligan, veiti eg mína hjartans tøkk.
Ein serlig tøkk til tykkum á Lágargarði fyri beinasemi við hølum og útgerð.

Blíðar heilsanir við ynskjum um einar gleðiliga páskir.

**Anna K. Vang, Kaldbak**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá elskaða mamma, vermamma og omma okkara

**Esther Dorthea Samuelsen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Pól J. Jóhannessen og Magnus Brahé Jørgensen, sum talaðu í kapellinum, og eisini ein tøkk til Jóhannes Ellingsgaard fyri orgulspælið í kapellinum.
Tøkk til Hanus Simonsen, prest, fyri vøkur og troystarfull orð í kirkjuni. Eisini ein tøkk til Vígdis, fyri vøkur orð um ommu sína í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á deild M á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sum vóru um hana ta seinastu tíðina hon livdi.
Tøkk fyri heilsanir, vitjanir, blómur og kransar.
Og tøkk fyri peningagávur til Sambýlið á Heygnum.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Gleðiligar páskir.

*Vegna familjuna*
**Kristian, Karl Martin og Gunnvør**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra kona, mamma og omma okkara

**Tordis Huus Nielsen**

doyði og varð jarðað.
Tøkk til tykkum mongu, sum á ymsan hátt stuðlaðu og hjálptu henni á hennara longu sjúkralegu og jarðarferð.
Tøkk til Sverra Steinhólm og Berg Debes Joensen fyri troystarrík orð.
Eisini tøkk til starvsfólk á Landssjúkrahúsinum og á Tjarnargarði.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og peningagávur til Gøtu kirkju.

**Ingolf**
**Poula við familju**
**Ingrid við familju**
**Niels Christian**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu, tá ið kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Eleonora Joensen**

doyði og varð jarðað.
Takk til Emil Olsen og Henning Bøgesvang fyri vøkru orð í kapellinum og í kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og gravarar, og tykkum, sum hjálptu so væl til við ervinum.
Takk til Eysturoyar Røktar- og ellisheim, sum tóku tykkum so væl av Noru, og okkum ta tíðina, ið hon var hjá tykkum.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Røktar- og ellisheimið.

Somuleiðis verður ynskt tykkum gleðiligar páskir.

*Vegna tey avvarðandi*
**Einar Joensen, Oyndarfjørður**

**Dagurin**

**7. apríl. Egesippus**, deyður umleið ár 180. Jødi í Róm, sum gjørdist kristin.
Jóhannes av Skarði varð føddur í Havn hendan dagin í 1911.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*